# Persónligar førleikar.

Mál :

Hvat vilja vit náa.?....

Sjálvkensla.

Vit vilja, at barnið kennir seg virt sum tað menniskja, tað er og kennir seg virðismett av okkum vaksnu. At barnið hevur eina positiva kenslu av sær sjálvum.

Sjálvsálit.

Vit ynskja, at barnið hevur álit á sær sjálvum so tað hevur áræði at royna okkurt nýtt.

Identitetur.

Vit ynskja at menna og varðveita identitetin hjá barninum vit hugsa um barnið her á stovninum og um barnið sum part av síni familju.

Hvussu megna vit hetta.?

Sjálvsvirði.:

Vit síggja og hoyra fegin barnið, vit tulka støður fyri og saman við barninum,eitt nú tá ein er uttanfyri spælið og gjarna vil verða við ,tá hjálpa vit barninum og geva “amboð “ so at barni sjálvt kann loysa støðuna.
Vit geva barninum ábyrgd og stuðla undir uppgávuna.

Vit møta barninum har tað er.Vit menna barnið í samskiftinum og síggja tørvin hjá tí einstaka.
Vit spæla við, og læra /hjálpa barninum at spyrja hini um hjálp.

Vit eru opin og týðulig vaksin, sum eru til staðar í okkara arbeiði.

Vit møta barninum við virðing ,respekt og vit vita, at barnið hevur rætt til egnar kenslur sum vit virða.

Vit lesa krop - máli hjá barninum, og hjálpa at seta orð á tað, vit síggja .Vit eru týðulig vaksin sum fyrihalda okkum til barnið og tess tørv.
Vit eru nærverandi og lurta eftir barninum. Vit tosa við virðing og virðismeta samtaluna við barnið.

Vit stuðla barnsins forvitni.
Vit læta barnið at verða við í praktiska arbeiðinum á stovninum t.d seta á borið og at halda skil á egnum skápi – sjálvandi eftir aldri.

Vit eru tilvitað um okkara krop - mál.
Vit eru positivt stuðlandi vaksin, sum sjálvi biðja um hjálp tá vit eru í støðum, har vit kenna okkum hjálparleys.
Vit viðurkenna, at vit ikki eru altvitandi.

Vit innrætta stovnin soleiðis, at tað er pláss at fordjúpa seg í friði og náðum,og eins til tað meiri rokaliga spælið.
Vit læta børnini at vera partur av bæði smærri og stórum bólkum.

Serligur tørvur..:

Tá eitt barn hevur serliga tørv, seta vit fokus á trivna, og tá er starvsfólkið serliga uppmerksamt.

Vit hava fleiri foreldrasamrøður, og tosa opið um trupulleikan.

Vit gera eina námsætlan til hetta barnið .

Vit hava samstarv við aðrar fakbólkar, barninum at frama.

Vit hjálpa barninum at trívast í bólkinum, og hjálpa hinum í bólkinum at skilja trupulleikan hjá barninum.

Vit arbeiða jaliga, og hava ikki altíð somu reglar fyri øll børnini.

# Sosialir Førleikar.

Mál .:
Hvat vilja vit náa ?

Vit vilja, at børnini virða mørk og ymiskleika hjá hvørjum øðrum.

Vit vilja, at tey vísa tolsemi og duga at vera partur av felagsskapinum á stovninum.

Vit vilja, at barnið dugir at spæla saman við øðrum.

At barnið dugir at seta orð á seg sjálvan og dugir at seta seg í støðuna hjá øðrum.

Hvussu gera vit hetta.?

Vit vaksnu seta orð á kenslur og handling .

Vit vísa empati – kenslur.

Vit geva barninum møguleika at vera í bólki við børnum í sama aldri og børnum í ymiskum aldri.

Vit hjálpa barninum at seta egin mørk og at virða mørk hjá øðrum.

Vit eggja barninum at verða partur av felagsskapinum á stovninum.

Vit hava samling hvønn morgun – eru í felagsskapinum.

Vit skapa rúm fyri spæli á stovninum.

Hvussu síggja vit, um tað eydnast.?

At barnið vil spæla við javnaldrar og onnur í ymiskum aldri.
At barnið dugur at seta orð á seg og sínar kenslur.
At barnið kennir síni mørk og virðir mørk hjá øðrum.
At barnið sjálvt roynir at loysa tvístøðu og tá barnið biður um hjálp at loysa tvístøðu,umframt tá ið tað vísir umsorgan fyri sær sjálvum og øðrum.

# Mál og samskifti.

Mál.:

Hvat vilja vit náa.?

Vit vilja styrkja málmenningina hjá barninum.

Vit vilja, at barnið skal gerast ført at brúka málið sum eitt amboð, t. d at seta orð á seg og sínar kenslur, upplivingar og fatan og at samskifta við onnur.

Vit vilja, at barnið dugir at brúka málið á ymiskan hátt, t.d tosa,syngja,rópa og annað.

Hvussu megna vit hetta.?

Vit tosa týðiliga við barnið .

Vit lesa søgur,syngja,spæla spøl og læra rím og ramsir.

Vit seta orð á barnið (seta orð á tað vit síggja, tá vit eru saman.)

Vit skiftast at tosa í bólkinum ,t.d í samling .Øll fáa møguleika at tosa og at lurta.

Vit vita, at vit eru fyrimyndir,so vit tosa hampiliga saman.

Vit nýta “stig fyri stig”

Hvussu síggja vit,um tað eydnast.?

At barnið tosar, syngur og spælir sær við málinum.

At barnið dugur at samskifta við málburði.

At barnið setur orð á seg sjálvan og onnur .

At barnið tosar – prátar – við onnur børn og vaksin.

# Børn og náttúra.

Mál .:

Hvat vilja vit náa.?

Vit vilja, at barnið lærir at vera góð/ur við náttúruna í gerandisdegnum.

At barnið upplivir náttúruna sum ein náttúrligan part av lívinum.

At barnið lærir um skiftandi árstíðirnar og skiftandi veðrið.

At barnið skilur, at vit øll skulu hava møguleika at vera her,bæði djór og menniskju.

At barnið lærir at virða umhvørvið og lærir um t.d dálking.

Hvussu gera vit hetta.?

Vit geva barninum upplivingar úti í náttúruni í – nærum – øllum veðri.

Vit eru her í garðinum og umhvørvinum uttan um, og vit fara longri túrar.

Vit fara í fjøruna, hagan, viðarlundina og t.d oman í býin .Vit læra at síggja mun á ymiskum umhvørvi, og hvussu vit bera okkum at úti í náttúruni.

Vit siga frá hvar og hví náttúran broytist alt árið.

Vit siga søgur um lívið í náttúruni,um djór og náttúru - fyribyrgdir.

Hvussu síggja vit um tað eydnast.?

Tá børnini eru vorðin tilvitað um náttúruna, t.d at árstíðirnar broytast og at veðrið broytist við .

Tá barnið vil vera úti í øllum veðri, og halda at tað er áhugavert.

Tá barnið virðir náttúruna og hugsa um ikki at kasta pappír úti í náttúruna.

Tá barnið kennir ymisk djór og ymiskar plantur,og virðir hetta.

Tá barnið gleðist um ,t.d fyrstu blómuna, og tá smálombini koma.

## Kroppur og rørsla.

Mál.

Hvat vilja vit náa.?

Vit vilja at barni mennist kropsliga og hevur eina góða krops - kenslu.

At barnið kennir sínar sansir og veit, at tað eigur sín kropp.

At barni lærir um ein sunnan og raskan kropp,- og kennir týdningin av júst hesum.

Hvussu vilja vit náa hesum.?

Vit geva barninum møguleikar at mennast fín og grov mortoriskt.

Vit eru inni og úti - saman og einsamøll .

Vit spæla rørslu spøl og seta orð á kroppin.
Vit tosa um mat og hvørja ávirkan matur hevur á okkara kropp.

Hvussu síggja vit, at hetta eydnast.?

Vit síggja, at barnið mennist kropsliga .Og at tey t.d klára at perla og annað sum er krevjandi.

Tá barnið sjálvt setir orð á sín kropp og kennir mun á at hava tað gott í kroppinum og á ikki at hava tað gott.

Tá barnið sjálvt skilur millum hvat er gott at eta og hvat er ósunt.

Tá barnið vísur gleði við at dansa,renna og spæla kropslig spøl.

# Mentan.

Mál .

Hvat vilja vit náa.?

Vit vilja, at barnið sær, at vit eru øll ymisk. Ymisk menniskju,ymisk lond o ymisk mentan.

Og at virða ymiskleika.

At barnið kennir til okkara mál og mentan sum føroyingar .

At barnið lærir føroyskar sangir , um okkara mentan og mál.

At barnið lærir um onnur lond og teirra mentan.

Hvussu vilja vit náa hetta.?

Vit tosa gott føroyskt mál.Vit syngja og vit kvøða, kvæði og vísir.

Vit læra um onnur lond og aðra mentan, at onnur ikki líkjast okkum , t.d húðalit og mentan.
Vit siga frá, hví vit t.d halda Òlavsøku, jól og Flaggdagin.

Vit vitja bónda ,vitja í fjøruni,vitja sjósavnið, listasavnið og onnur søvn í landinum.

Vit fara á legu við børnunum og vísa teimum onnur støð.

Hvussu síggja vit um tað eydnast.?

Tá vit vita at barni vísur bæði okkara mentan og øðrum mentanum áhuga.

Tá barnið er forvitið og vísir áhuga í evnum sum vit hava tosa um.

Tá barni vísir tolsemi við aðrai mentan og virðir ymiskleikan.

# Skapandi evni.

Mál .

Hvat vilja vit náa.?

Vit vilja, at barnið varðveitir síni viðføddu skapandi evni.

Vilja, at barnið nýtir síni skapandi evni og nýtir sínar sansir.

Vit vilja, at barnið hevur møguleika at " úttrykkja" seg kreativt.

Vilja, at barnið fær møguleika at royna ymiskt tilfar.

Hvussu náa vit hetta.?

Vit hava eitt gott verkstað á stovninum við sera nógvum og áhugaverdum tilfari.
Vit gera kreativ- verkstøð, so hvørt barn hevur møguleika at arbeiða kreativt.

Vit lata barnið taka stig til at vera kreativt og skapandi.
Vit lata barnið vera skapandi á ymsan hátt, mála, tekna , syngja og spæla sjónleik.

Vit syngja saman og hava ljóðføri við .

Hvussu vita vit at hetta er eydnast.?

Tá vit síggja at barnið gleðist um at vera skapandi .

Tá barnið sjálvt tekur stig at skapa, bæði sjálv og saman við hinum.

Tá barnið torir og hevur áræði at royna seg sjálvt ella sjálvi at seta í gongdkreativan leik.